## Bláí Krossur fegnast um avgerð

At Løgtingið feldi uppskotið um at gera tað møguligt at bryggja sterkari øl í Føroyum, heldur Bláí Krossur vera røttu leiðina at ganga. Serliga havandi í huga, at ølnýtslan í Føroyum, máld í alkohol litrum, er frá 1993 til 2007 økt við 36% - frá 99.000 litrum til 135.000 litrar. Somuleiðis er samlaða alkoholnýtslan vaksandi. - Hetta eigur at seta nakrar ávaringarklokkur í gongd, sigur Hjalmar Hansen, aðalskrivari í Bláakrossi (myndin). Ein máti at tálma nýtsluni er at gera tað verri at fáa fatur á rúsdrekka. Bláí Krossur tekur undir við uppskotinum hjá Fólkaheilsuráðnum, at beinleiðis sølan hjá bryggjaríum eigur at halda uppat. Vit halda, at øll søla av rúsdrekka skal fara ígjøgnum Rúsdrekkasølu Landsins.



## Eingin keypir bil

Fíggjarkreppan í Íslandi ger, at íslendingar eru at kalla givnir at keypa bilar. Hagstovan í Reykjavík sigur, at í november vórðu 123 bilar skrásettir fyri fyrstu ferð, og so lítið hevur hetta tal ikki verið, síðani hagstovan fekk uppgávuna í 1995. Ellivu teir fyrstu mánaðirnar í ár vórðu 12.231 nýggir bilar skrásettir, og tað er 42,3 prosent færri enn somu mánaðir í 2007. Hinvegin vísa hagtølini, at íslendingar brúka gjaldskortið meiri nú enn fyrr. Frá januar til oktober brúktu teir gjaldskortið 3,9 prosent meiri enn somu mánaðir í fjør.

# Lítil áhugi at verða superstjóri í heilsuverkinum

**Bara tríggjar umsóknir komu inn til illa umstrídda starvið sum ovasti leiðari fyri alt tað føroyska heilsuverkið, men mótstøðan ímóti starvinum er so stór, at nú verður tað kanska av ongum kortini**

HEILSUVERKSTJÓRI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Fær nýggi superstjórin fyri alt tað føroyska heilsuverkið, ikki tær heimildir, sum ætlanin var, er tað betri, at starvið ikki verður sett, heldur Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður. Mótstøðan ímóti starvinum er so stór, at tað tað kann væl henda, at tað verður niðurlagt, longu áðrenn tað er sett*

Tað er ikki serliga stórur áhugi fyri at átaka sær tað umstríddu uppgávuna at verða yvirstjóri fyru øll tey trý sjúkrahúsini.

Tað er nakað síðani, at Heilsumálaráðið søkti eftir einum heilvuverksstjóra við ógvuliga víttgangandi heimildum.

Og nú umsóknarfreistin er úti, vísir tað seg, at bara tríggir umsøkjarar eru til starvið.

Poul Geert Hansen, aðalstjóri í Heilsumálaráðnum staðfestir, at talan er um tríggjar føroyingar, sum haa søkt.

Men tað er eisini tað einasta, hann vil siga um umsøkjararnar

Hann leggur afturat, at nú fara tey at kanna umsóknirnar og tá verður støða tikin til, um umsøkjarar skulu boðsendast til setanarsamrøður, ella um starvið skal lýsast leyst av nýggjum.

### Ógvuliga víðar heimildir

Nýggi heilsustjórin fær ógvuliga víðar heimildir við tað at hann skal samskipa tey trý sjúkrahúsini og hann skal samstundis tryggja at pengar og starvsfólk í heilsuverkinum verða gagnnýtt sum best. Harafturat fær hann evstu ábyrgdina viðvíkjandi fyrisiting, fíggjarligari játtan og í starvsfólkamálum í heilsuverkinum

Stutt sagt fær hann alla yvirskipaðu umsitingarligu leiðsluna av teimum trimum sjúkrahúsunum og hann fær rætt og skyldu til at taka stig á øllum økjum

í Heilsuverkinum, umframt at hann fær ábyrgdina av, hvussu tey trý sjúkrahúsini verða skipað.

### Kanska av ongum

Tað er fallið nógvum fyri bróstið at heilsuverksstjórin skal fáa so stórar heimildir, sum talan er um. Bæði úr Suðuroy og í Norðoyggjum hevur verið mælt frá at geva einum einsamøllum stjóra so stórt vald, tí tey stúra fyri, at tað fer at forkoma teimum báðum smærru sjúkrahúsunum og nógvir politikarar duga ikki at síggja nakað sum helst skil í at seta ein stjóra afturat í heilsuverkinum.

Og nú kann tað henda, at starvið verður av ongum kortini.

Nú fíggjarlógin fyri næsta ár skal snikkast saman, hevur fíggjarnevndin biðið Hans Paula Strøm, landsstýrismann í heilsumálum, koma við einum uppskoti um eina alternativa loysn, har ætlaða virksemið hjá heilsuverksstjóranum verður skipað inni í sjálvum Heilsumálaráðnum í staðin fyri, sum ein yvirskipað leiðsla.

Grundgevingin fyri hesi umbønini er at hava eina loysn at detta aftur á, skuldi tað hent, at politisk undirtøka ikki er fyri at geva heilsuverksstjóranum so víðar heimildir, sum talan hevur verið um.

Hans Pauli Strøm sigur, at fortreytin fyri, at heilsuverkstjórin kemur at røkka sínum endamáli er, at hann fær tær neyðugu heimildirnar til at fyriskipa virksemið tvørturum tey trý sjúkrahúsini og serviðgerðina uttanlands.

- Hetta krevur, at sjúkrahúsleiðslurnar, sum eru, verða umskipaðar við skerdum myndugleika og at sjúkrahúsini í roynd og verðu fáa eina felags ovastu leiðslu, sigur hann.

- Skulu leiðslurnar á teimum trimum sjúkrahúsunum hinvegin varðveita sínar heimildir, verður heilsuverksstjórin eitt óneyðugt eyka leiðsluið, sum kann røkjast betri verið við teimum heimildum, sum longu liggja í Heilsumálaráðnu.

Landsstýrismaðurin leggur afturat, at er ikki polistisk undirtøka fyri at geva stjóranum tær neyðugu heimildir, er tað frægari at skipa eina deild í sjálvum Heilsumálaráðnum, heldur enn at seta ein heilsuverksstjóra við skerdum heimildum.

Og nú skal so politiska og fíggjarliga telvingin næstu dagarnar vísa, hvørja lagnu ætlaði superstjórin í heilsuverkinum fær.

# Raðfesti familjuna fram um stjórastarv

**Tað var longsul eftir at vera meiri saman við familjuni, sum fekk Dánjal Andreasen at siga stjórastarvið á Strandferðsluni frá sær**

UPPSØGN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tá ið Dánjal Andreasen flutti til Suðuroyar at taka við starvinum sum stjóri á Strandferðsluni, undirmetti hann, hvussu ringt tað fór at vera at vera burtur frá familjuni.

Tað er orsøkin til, at hann nú hevur sagt upp sum stjóri á Strandferðsluni, bara sjey mánaðir eftir, at hann var settur sum stjóri á Strandferðsluni.

Tað fortaldi hann í tíðindunum á Rás2 seinnapartin í gjár.

Hann segði, at tað vísti seg ikki at bera til hjá konuni at fáa arbeiðið í Suðuroy og tí føldi hann seg ov einsamallan.

- Seinastu mánaðirnar havi eg merkt, at tað telur nokk so nógv, legði hann afturat.

Tí hevur hann gjørt av at flyta norður eftir aftur og at fáa eitt arbeiðið, har hann kann vera meiri saman við familjuni, segði hann.

Hann fer úr stjórastarvinum á Strandferðsluni 1. februar og tá hevur hann fingið annað starv, men hann vil ikki siga, hvat starv, talan er um.

Hann heldur, at ein nýggjur stjóri á Strandferðsluni hevur betri møguleika at trívast í starvinum, vissi tað verður ein, sum hevur røtur í Suðuroy og sostatt er kjølfestur har.

Hann leggur kortini dent á, at suðuroyingar hava tikið ómetaliga væl ímóti honum og at hann hevur kent seg sera væl ímillum suðuroyingar.

Sostatt leggur hann dent á, at tað ikki upp á nakran máta er ónøgd við starvið, ella starvsfólkið, ella arbeiðsumstøðurnar annars, sum nú fingu hann at siga upp.

- Tað er við sorgblídni, at eg fari av Strandferðsluni, sigur hann.

Hann heldur eisini, at Strandferðslan er ein vælvirkandi stovnur, har hon liggur á Tvøroyri.

- Strandferðslan liggur væl á Tvøroyri og hon virkar væl, leggur Dánjal Andreasen afturat.



*Tá ið Dánjal Andreasen bjóðaði seg fram at verða stjóri á Strandferðsluni, undirmetti hann, hvussu ringt tað fór at verða at vera burturi frá familjuni. Og tað eydnaðist ikki konuni at fáa starv í Suðuroy og tí er tað við sorgblídni, at hann nú pakkar hann sekkin*